gult2 cyan2 magenta2 svart2



# Listaframsýning á Torginum í SMS

**Hesa vikuna hava tey trý Arngerð og Sólmundur Joensen og Susanne Nielsen listaframsýning á Torginum í SMS.**

LISTAFRAMSÝNING

Fyri trimum árum síðan tóku hjúnini Arngerð og Sólmundur Joensen stig til at seta á stovn Hoyvíkar Listaskúla. Skúlin skipar fyri skeiðum, sum eru ætlað bæði royndum og óroyndum listamálarum. Arngerð, sum sjálv hevur undirvíst á Tórshavnar Kvøld- og ungdómsskúla í fleiri ár, sigur, at øll kunnu læra at mála uttan mun til aldur og kyn. Og undirtøkan er góð. Tey bæði hava eisini undirvíst á bygd, og har hevur undirtøkan somuleiðis verið góð.

Á framsýningini á Torginum í SMS sýna Susanne Nielsen og hjúnini bæði Sólmundur og Arngerð Joensen fram listaverk síni. Stílurin hjá teimum er naturalistiskur, im- og ekspressionistiskur og abstraktur.

Framsýningin lat upp týsdagin og er opin til leygardagin.

Í morgin, fríggjadagin, er nakað av undirhaldi á Torginum. Kl 14 syngur Leirvíkar Gentukór, og kl 16 spælir ein harmonikubólkur av Norðfjørðinum í Íslandi á Torginum.

Leygardagin kl. 13 syngur norska manskórið »Breistein«.



*Arngerð og Solmundur Joensen hava listaframsýning á Torginum*

# Føroya Tele í altjóða samstarvi

FJARSKIFTI
*Eirikur Lindenskov*

Í fjør fór Føroya Tele upp í samstarv við fjarskiftisfeløg í øðrum smáum londum, og gjørt varð eitt teleforum fyri samskifti um felags avbjóðingar, hugskot og royndir.

Andras Róin, stjóri á Føroya Tele sigur, at fjarskiftisfelagið á Malta bjóðaði til fundin, sum varð hildin á Malta 24. og 25. mai. Fyri Føroya Tele vóru stjórin sjálvur og nevndarformaðurin, Jógvan Ellefsen, á fundi.

Framløgurnar vóru gjørdar av umboðum úr Andorra, Kypern, Malta, Grønlandi, Isle of Man, Íslandi, Liktinstein, Luksemburg og Føroyum. Síðan var kjak um tey ymisku evnini, og umboðini kundu staðfesta, at hóast ymiskt er, hvussu t. d. kappingartilgongdin hevur verið í teimum ymisku londunum, so hava feløgini sera nógv til felags.

Fjarskiftisfelagið úr San Marino hevur bjóðað til triðja fundin, sum verður hildin í San Marino í heyst.

Føroya Tele fegnast um, at tað við samstarvinum í hesum teleforum er møguligt at kjakast um felags avbjóðingar, at læra av hvørjum øðrum og at fáa tættari samstarv og samband í lag millum fjarskiftisfyritøkur í teimum smærru londunum, sigur Andras Róin.

# Føroya Tele dagførir GSM-kervið

FJARSKIFTI
*Eirikur Lindenskov*

Føroya Tele og Ericsson Danmark hava gjørt avtalu um, at stórur partur av GSM fartelefonstøðini verður útskift, víðkað og dagførd. Samstundis verður GSM-skipanin víðari útbygd við fleiri basisstøðum, soleiðis at dekningurin verður betri, og fleiri rásir verða tøkar.

Í heyst fer Føroya Tele harumframt at keypa eina nýggja høvuðstelefonstøð til fastnetstænastuna, eins og fleiri minni støðir skulu keypast.

Afturat hesum eru eisini samráðingar millum Føroya Tele og Ericsson um víðarimenning av GSM skipanini til tað sokallaðu GPRS skipanina, sum m. a. inniber eina fleirfalding av dataflutningsorkuni á fartelefonkervinum, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele

# 774 nýggj akfør í fjør

BILAR
*Eirikur Lindenskov*

Innflutningurin av akførum vaks við góðum seks prosentum í fjør, tá føroyingar innfluttu 774 nýggj akfør. Meginparturin var sum vant persónbilar, 557.

143 nýggir vørubilar vóru skrásettir og 26 viðfestisvognar.

Yvirlitið frá Bileftirlitinum sær soleiðis út:

| Akfaraslag | 2000 | 2001 |
|---|---|---|
| Brandblar | 1 | 0 |
| Bussar | 1 | 2 |
| Hýruvognar | 5 | 2 |
| Lastbilar | 8 | 6 |
| Leguvognar | 2 | 3 |
| Motorsúkklur | 0 | 2 |
| Líkvognar | 2 | 0 |
| Neyðsendarakfar | 1 | 1 |
| Persónbilar | 577 | 577 |
| Smábussar | 3 | 6 |
| Tangabilar | 1 | 0 |
| Viðfestivognar | 10 | 26 |
| Vøruvognar | 118 | 143 |
| Samlað | 729 | 774 |



*Í fjør keyptu føroyingar eins nógvar persónbilar, sum árið fyri: 577 hvørt árið*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

†

Tað verður hervið kunngjørt, at elskaði maður mín, kæri pápi, verpápi, abbi, langabbi og beiggi okkara

**Karsten Elias Hansen,**
**Klaksvík**
**vanliga nevndur Karsten í Svínoy**

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsmorgunin 5. juni 80 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum hóskvøldið 7. juni klokkan 19.

Jarðarferðin verður úr Betesda fríggjadagin 8. juni klokkan 13.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ragnhild, Hanus, Jóannes og Fingerð**

gult3 cyan3 magenta3 svart3




Hvør leikur hevur týdning



Tá tú skalt gera íløgur í virðisbrøv, skalt tú hugsa teg væl um, tí hvør leikur hevur týdning. Kaupthing er til reiðar at seta saman íløguna, sum passar júst til tín tørv og títt lyndi - eina íløgu sum tú kanst vera tryggur við.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn
tel. 35 1500 • fax 35 1501
www.kaupthing.fo